# TAKLAR OG

– Eg havi altíð havt tveir dreymar um, hvat eg skuldi gerast, tá eg bleiv stórur. Annað ynskið var at gerast fótbóltsspælari og hitt var at gerast fashion-designari. Fótbóltsdreymurin varð uppfyltur, men eg havi allatíðina eisini havt dreymin um at arbeiða við onkrum innanfyri móta, sigur Hans Fróði Hansen, sum er vorðin eitt heitt navn innan mótaheimin í Íslandi

**Samrøða** | Eydna Skaale | eydna@sosialurin.fo



Her heima er hann serliga kendur frá fótbóltinum, sum forstopparin, ið voldi øllum áleyparum trupulleikar. Og so eisini fyri sín sermerkta stíl, sum brýtur frá vanligu føroysku mannfólkaklæðunum.

Í Íslandi er Hans Fróði Hansen eisini um at gerast eitt kent navn. Hann hevur nevniliga úr at gera innan móta og styling og er umbiðin bæði í Íslandi og eisini longri úti í heimi.

## Útbúgvingar

Hans Fróði flutti til Íslands at fylgja fótbóltsdreyminum og gerast yrkisleikari. Men har fekk hann samstundis eisini hin dreymin, um at arbeiða innan mótaheimin, uppfyltan.

Fyrst fekk hann arbeiði hjá eini stórari kosmetik-fyritøku, har hann í fyrstu atløgu tók sær av útlendska marknaðinum.

Har lærdi hann alt um make-up og tók eisini eina útbúgving sum make-up artistur.

Hetta gav Hans Fróða hug at læra meiri um mótaheimin og –marknaðin, og hann tók tí eisini eina útbúgving sum fashion stylist.

Við hesum báðum útbúgvingunum kann Hans Fróði geva sonevndar make-overs, har fólk, ið eru ráðaleys innan mótaheimin, kunnu fáa góð ráð um, hvat klæðir teimum. Tey verða latin í, klipt, smurd og stylað, og eru ofta ikki at kenna aftur.

Men Hans Fróði Hansen vildi læra meir. Hann slapp inn á ein skúla í London, har hann varð útbúgvin Image Consultant. Við hesi útbúgvingini kann hann ráðgeva um móta, stíl og útsjónd yvirhøvur.

Hesar tríggjar útbúgvingarnar, ið Hans Fróði hevur nomið sær, gera tilsamans, at hann kann arbeiða innan nógv ymisk starvsøki.

– Sum Image Consultant arbeiði eg m.a. fyri tær stóru fyritøkurnar í Íslandi, har eg arbeiði við at skapa júst tað rætta image'ið til fyritøkunar, soleiðis, at tær kunnu vera fremst í øllum – eisini innan image. Tá sigi eg m.a. starvsfólkinum, hvussu tey skulu lata seg í, og hvussu tey kunnu seta hárið fyri at síggja best út. Eg læri tey um húðrøkt, make-up, klæðir, ja, alt, sum hevur við útsjóndina at gera. Eg læri tey eisini, hvussu tey best presentera seg sjálvi og fyritøkuna, greiðir Hans Fróði Hansen frá.

Hann sigur, at hetta er nakað, sum íslendskar –og útlendskar fyritøkur sum heild, leggja nógvan dent á, og Hans Fróði hevur tí nógvar tílíkar uppgávur.

Men hann verður eisini umbiðin av einstaklingum, sum biðja um hansara ráð og hjálp.

– Tá eg arbeiði við einstaklingum, gevi eg eisini ráð um útsjónd og royni at gera tað so, at onnur fólk fáa eina positiva fatan av viðkomandi, tá tey hittast fyrstu ferð. Hetta arbeiðið er sjálvandi á einum nógv meira persónligum støði, greiðir Hans Fróði Hansen frá.

Hann setir sær tá tíð av til at læra viðkomandi at kenna. –Tí, sum hann sigur, – tað nyttar einki at broyta tað uttara, um tað innara ikki fylgir við.

Hann nýtir nógva tíð at tosa við kundan, fyri at hoyra um persónlig ynski. Hann hittir kundan fleiri ferðir, og lurtar gjølla eftir, hvat tað er, sum kundin ynskir at broyta. Hann viðmælir frisørar, merki og handlar, sum umboða tað, ið kundanum tørvar.

Endamálið er at fáa kundan at kenna seg væl, samstundis, sum tað sær væl út og sendir røttu tekinini.

## Ongantíð ivast

Men hóast hetta ikki ljóðar sum eitt typiskt mannfólkaarbeiði fyri ein ungan mann úr Leirvík, so hevur Hans Fróði ongantíð ivast í at fara eftir tí, sum hann hevur havt hug til.

– Hevði eg vitað av hesum møguleikanum fyrr, var eg langt síðani farin undir hesar útbúgvingarnar. Hvat onnur halda um tað, sum eg geri, leggi eg ikki so nógv í, slær hann fast.

Men hittir hann ikki onkuntíð ristandi høvd og ryktar brýr, tá hann fortelur, hvat hann ger?

– Fólk, sum kenna meg, og sum vita, hvussu eg eri, vita, at hetta er akkurát nakað fyri meg. Tey flestu halda tað vera gott, at eg geri tað, sum eg havi hug til, sigur Hans Fróði.

Men hann viðgongur, at tað er munur á reaktiónunum, hann fær frá føroyingum og teimum, hann fær frá t.d. íslendingum. Og hann sigur seg ikki duga at skilja, hví føroyingar eru so afturhaldnir.

– Ofta skifta føroyingar fullkomiliga ham, tá teir koma uttanlands. Tá kenna teir seg fríar og tora at gera tað, teir hava hug til. Men so leingi teir eru í Føroyum, er tað tað, sum hini hugsa og halda, sum vigar mest. Fólk avmarka seg sjálvi fyri at vera sum hini, og tað skilji eg ikki, sigur Hans Fróði.

Hann vísir á, at hugsunarhátturin er nógv broyttur úti í heimi í seinastuni, og føroyingar halta aftaná.

– Í dag hava øll eina útbúgving, øll hava lisið okkurt, øll eru okkurt. So hóast tú ert væl útbúgvin, er tað ikki vist, at tú fært dreymastarvið. Tað er altíð onkur annar, sum er eins væl útbúgvin og tú. Tí er tað nú tú sum persónur, sum verður tungan á vágskálini, um tú fært arbeiðið ella ikki. Soleiðis eru treytirnar á alheimsmarknaðinum, og tí hevur tað týdning at gera sær